Skotar høvdu ferðina og føroyingarnir skilið

U–19 landsliðið stóð seg væl í 2. hálvleiki, tá ið teir fingu spenning í uppgerðina ímóti heimaliðnum, sum kortini í evstu løtu økti til 3–1

U–19 EM UNDANKAPPING

Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tá ið úrslitini hjá U–17 landsliðnum í undankapping fyri stuttum verða havd í huga, so kann tað ikki roknast at vera verri enn ilt, tá ið U–19 landsliðið leygardagin seinnapartin tapti 3–1 í Skotlandi. Mótstøðuliðið var heimaliðið, sum í 7. og 14. minutti legði seg á odda 1–0 og 2–0. Í fyrra førinum royndi Gunnar Nielsen í málinum at sparka burtur, men tað var so óheppið, at bólturin rakti í mótstøðumann og sigldi so í netið. Í seinna førinum sneiddi ein seg leysan í vinstru, áðrenn hann varð leysur og smekkaði til.

– Tað er sama søgan umaftur og umaftur. Teir eru skjótari og títtari, enn okkara spælarar eru tað, sigur Jógvan Martin Olsen millum annað um dystin hjá U-19 liðnum leygardagin

Sambært venjaran, Jógvan Martin Olsen, hevði føroyska liðið tak á spælinum fitta løtu eftir steðgin. Tá eydnaðist tað eisini at minka um munin. Magnus Skoradal sendi fírspark úr høgru flatt í brotsteigin, har Justinus R. Hansen fekk fótin á og stýrdi bóltinum í málið.

So var 2–1, og kanska høvdu føroyingar møguleika at javna. Men í næstsíðsta minuttinum skoraði Skotland við brotssparki til 3–1. Talan var um rættuliga óhepna støðu, greiðir venjarin frá:

– Annar av miðverjunum hjá okkum, Poul N. Poulsen, brast saman við mótstøðumann. Teir lógu báðir, og okkara maður royndi at sleppa upp. Bólturin var langt burtur, meðan teir báðir lógu í føroyska brotsteiginum. Mótstøðumaðurin helt okkara mann í beinið. Poul royndi at krøkja seg leysan fyri at reisa seg. Men dómarin metti, at hann hevndi seg inn á móstøðumannin. Hann bríkslaði fyri brotssparki, meðan allir stóðu sum kánus, og skotar øktu um munin til 3–1.

Jógvan Martin harmast um, at munurin gjørdist tvey mál. Hann heldur ikki, at mótstøðumenninir vóru eitt sindur, men ikki so ógvuliga nógv betri enn føroyingarnir.

– Tað er sama søgan umaftur og umaftur. Teir eru skjótari og títtari, enn okkara spælarar eru tað. Men tað er týdningarmikið at undirstrika, at teir avgjørt ikki hava størri fótbóltsskil ella taktiska fatan, enn føroysku spælararnir hava tað, og teir hava ikki betri bóltførleika. Men munurin í skjótleikanum var eisini hesa ferð avgerandi, sigur Jógvan Martin Olsen.

Undan fráferðini til Skotlands gav Ingi Højsted úr Arsenal avboð orsaka av skaða. Símun Samuelsen var ikki førur fyri at spæla leygardagin, tí hann hevði influensu, og Rasmus Nolsøe var leikbannaður orsaka av korti, sum hann fekk í kappingini í fjør. Tveir føroyskir spælarar noyddust leygardagin at lata seg skifta út, tí at teir vóru skaddir.

Í hinum dystinum leygardagin vann Turkaland 3–1 á Makedonia. Føroyska liðið skuldi spælar aftur í gjárkvøldið.

Føroyska liðið leygardagin á vøllinum hjá Ayr United sá soleiðis út: Gunnar Nielsen, Frem – Jónas Þór Næs, Frem, Poul N. Poulsen, VB, Marni Djurhuus, EB/Streymur, Bárður Olsen, EB/Streymur (Hanus Jacobsen, GÍ, 46.) – Justinus R. Hansen, NSÍ, Høgni Madsen, GÍ, Bergur Midjord, B36 (Hansu Thorleifsson, Skála, 51.), Magnus Skoralið, GÍ – Páll M. Joensen, HB, Rókur Jespersen, HB.

Bárður Olsen í 44. minutti og Hanus Thorleifsson í 55. minutti fingu gult kort, meðan Poul N. Poulsen varð rikin av vøllinum í 89. minutti.

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 Brøndby (S)	14	10	-	2	-	2	22	8	14	32
2 Esbjerg	14	9	-	3	-	2	27	14	13	30
3 FCK (M)	14	8	-	4	-	2	22	11	11	28
4 OB	14	7	-	4	-	3	30	18	12	25
5 AaB	14	7	-	3	-	4	18	14	4	24
6 FCM	14	7	-	2	-	5	28	19	9	23
7 Viborg	14	4	-	4	-	6	25	23	2	16
8 Herfølge	14	4	-	3	-	7	13	17	-4	15
9 Frem	14	4	-	1	-	9	15	27	-12	13
10 AGF	14	4	-	1	-	9	19	33	-14	13
11 FC Nordsj.	14	2	-	4	-	8	14	29	-15	10
12 AB	14	2	-	1	-	11	10	30	-20	7

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 AC Horsens	13	11	-	1	-	1	25	8	17	34
2 Randers FC	13	9	-	2	-	2	37	19	18	29
3 Silkeborg	13	8	-	3	-	2	28	10	18	27
4 Køge	13	7	-	3	-	3	26	20	6	24
5 HFK Sønderj.	13	7	-	2	-	4	38	21	17	23
6 FC Nordjylland	13	7	-	1	-	5	17	17	0	22
7 Ølstykke	13	7	-	0	-	6	31	25	6	21
8 Skjold	13	6	-	2	-	5	28	24	4	20
9 Fredericia	13	6	-	2	-	5	20	19	1	20
10 Nykøbing	13	4	-	3	-	6	21	23	-2	15
11 B 93	13	4	-	2	-	7	23	26	-3	14
12 Vejle	13	4	-	2	-	7	21	28	-7	14
13 Fremad Amager	13	3	-	3	-	7	19	26	-7	12
14 B 1913	13	1	-	4	-	8	12	32	-20	7
15 Brønshøj	13	2	-	1	-	10	15	39	-24	7
16 FC Aarhus	13	2	-	1	-	10	12	36	-24	7

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Jann Ingi Petersen (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 Næstved	13	10	-	1	-	2	33	11	22	31
2 Dalum	13	8	-	2	-	3	31	20	11	26
3 HIK	13	7	-	2	-	4	26	22	4	23
4 Holbæk	13	6	-	4	-	3	23	20	3	22
5 B1909	13	6	-	2	-	5	29	22	7	20
6 Jetsmark	13	5	-	5	-	3	24	19	5	20
7 Brabrand	13	5	-	4	-	4	26	19	7	19
8 Slagelse	13	5	-	3	-	5	23	18	5	18
9 Lyngby	13	4	-	5	-	4	23	24	-1	17
10 Kalundborg	13	4	-	4	-	5	27	30	-3	16
11 Kolding FC	13	4	-	3	-	6	19	23	-4	15
12 Holstebro	13	4	-	3	-	6	21	26	-5	15
13 Glostrup	13	4	-	1	-	8	19	30	-11	13
14 Skive	13	3	-	3	-	7	28	31	-3	12
15 Hvidovre	13	3	-	2	-	8	17	31	-14	11
16 Hjørring	13	3	-	2	-	8	15	38	-23	11

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Lyngby)

Skotska Premier League

	d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1 Celtic	10	9	-	1	-	0	28	3	25	28
2 Rangers	10	7	-	2	-	1	27	8	19	23
3 Hearts	10	5	-	2	-	3	15	14	1	17
4 Dundee	10	4	-	3	-	3	13	11	2	15
5 Hibernian	10	4	-	2	-	4	11	14	-3	14
6 Livingston	10	3	-	4	-	3	10	10	0	13
7 Motherwell	9	3	-	3	-	3	10	12	-2	12
8 Dunfermline	9	3	-	3	-	3	8	10	-2	12
9 Kilmarnock	10	3	-	2	-	5	12	20	-8	11
10 Dundee Utd.	10	2	-	3	-	5	7	17	-10	9
11 Aberdeen	10	2	-	1	-	7	9	20	-11	7
12 Partick	10	0	-	2	-	8	8	19	-11	2

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

VIÐMERKINGAR

Svarskriv til fyrispurning frá Elini Lindenskov, dagfest 15. oktober 2003, svaraður á almennum býráðsfundi tann 23. oktober 2003

Jan Christiansen
Borgarstjóri

Brævið hevur í yvirskriftini 2 spurningar: Hvussu skal framhaldsdeildin í fólkaskúlanum skipast í framtíðini í Tórshavnar kommunu? Nær verður uppskotið um felags framhaldsdeild viðgjørt í mentamálanevndini?

Í brævinum verður vístil eitt annað bræv, dagfest 11. mars 2002, við uppskoti um at gera eina felags framhaldsdeild fyri teir 5 skúlarnar í kommununi, sum í dag bert hava grunddeild. Sagt verður, at uppskotið er sent býráðnum, men at tað ongantíð er viðgjørt í mentamálanevndini.

Taka vit seinna spurningin í yvirskriftini fyrst: **Nær verður uppskotið um felags framhaldsdeild viðgjørt í mentamálanevndini**, er at siga, at:

Uppskotið varð viðgjørt í mentamálanevndini ein mánað eftir, at tað varð skrivað.

Á fundi í **mentamálanevndini 10. apríl 2002:** var samtykt at fylgja uppskotsstillaranum í: at uppskotið skuldi verða sent til ummælis hjá skúlastýrunum og skúlaleiðslunum.

Í brævi, dagfest 19. apríl 2002, sendir mentamáladeildin uppskotið til ummælis.

Bara <u>ein</u> skúli hevur svarað, og er tað Sankta Frans skúli, sum tók undir við uppskotinum um felags framhaldsdeild fyri teir 5 skúlarnar.

Enn er onki svarskriv komið frá øðrum skúlum.

Fara vit so til annan spurningin í yvirskriftini: **Hvussu skal framhaldsdeildin í fólkaskúlanum skipast í framtíðini í Tórshavnar kommunu?** er at siga, at:

Nýggja fólkaskúlalógin, sum kom í gildið í 1997, setur heilt øðrvísi krøv til m.a. undirvísing, skúlastovur og samstarv. Tí hevur verið arbeitt við at endurskoða skúlabygningarnar í kommununi við atliti til at dagføra teir, soleiðis at teir koma at lúka hesi krøv.

Stóra útstykkingin í Hoyvíkshaganum seinastu árini hevur havt við sær, at har er - og verður - ein stór miðsavnan av barnafamiljum. Tí varð farið at fyrireika bygging av nýggjum skúla við Løgmannabreyt.

Á fundi í **mentamálanevndini 25. september 2002** var samtykt: at skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1. - 9. flokk, íroknað frítíðarskúla, og at núverandi Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1. - 9. flokk.

Somuleiðis varð samtykt: at 10. flokkarnir fara oman í Eysturskúlan.

Arbeitt hevur verið víðari við skúlanum við Løgmannabreyt, og var málið enn einaferð viðgjørt, tá programmið var liðugt herfyri.

Í **mentamálanevndini 16. september 2003** er samtykt: at taka undir við programminum, og á **býráðsfundi 25. september 2003** var einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá dispositión og projektuppskot eru liðug.

Viðvíkjandi skúlanum í Kollafirði er at siga, at áðrenn Kollafjørður og Havnin løgdu saman, var skúlasamstarv millum kommunurnar í Norðstreymoy, í Sundalagnum og norðara parti av Eysturoynni. Næmingarnir í hesum bygdum ganga í framhaldsdeildini í Felagsskúlanum á Oyrarbakka. Men eftir at Havnin og Kollafjørður løgdu saman, fara næmingarnir í Kollafirði í framhaldsdeildina í Eysturskúlanum. Talan er um einar 30 - 40 næmingar.

Tann "relativt" langa flutningsleiðin hjá næmingunum og tessvegna drúgvi skúladagurin hevur gjørt, at næmingar og foreldur í Kollafirði hava ynskt at fáa eina framhaldsdeild í bygdini.

Mentamálanevndin hevur 5. februar 2003 samtykt: at taka undir við, at í framtíðini kemur 8. og 9. flokkur at vera í skúlanum í Kollafirði.

Byggiprogramm og dispositiónsætlan vóru lødd fram til kunningar í **Kollafjarðarnevndini 31. januar 2003** og í **býráðnum 20. februar 2003.**

Tilskilast skal, at seinastu árini hevur eitt skipað skúlasamstarv verið millum skúlarnar í Kollafirði og Kaldbak. Kaldbaksbørn eru nakrar tímar um vikuna í Kollafirði, t.d. í teimum handaligu fakunum og í ítrótti. Í framtíðini "kann hugsast", at skúlanæmingarnir í Kaldbak "heldur fara" í framhaldsdeildina í Kollafirði enn í Eysturskúlan.

Á **býráðsfundi 20. februar 2003** varð samtykt at, uppskotið um felags framhaldsdeild fyri skúlarnar í kommununi verður beint í mentamálanevndina.

Viðmerkjast skal, at málið er ikki viðgjørt sum serstakt mál. Men spurningurin um framhaldsdeild verður tikið upp á komandi fundi í mentamálanevndini til framhaldandi viðgerð.

Verður tikið samanum, kann staðfestast at:

- Nýggi skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1. til 9. flokk
- Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1. til 9. flokk
- Skúlin í Kollafirði verður ein 1-sporaður skúli frá 1. til 9. flokk

Til spurningin, um nøkur ætlan er at orða ein framtíðar skúlapolitikk fyri kommununa?

Er svarið: Jú, tað verður arbeitt við einum framtíðar skúlapolitikki, sum verður orðaður at leggja fyri mentamálanevndina og býráðið.

Stórar avbjóðingar liggja fyri framman. Her verður serliga hugsað um næmingarnar í 10. flokki, har neyðugt verður at víðka og menna samstarvið, ið longu er millum skúlarnar, soleiðis at 10. skúlaárið gerst ein hóskandi og spennandi avbjóðing fyri okkara skúlaungdóm.

Svarskriv til fyrispurningar frá Elini Lindenskov, dagf. 15. okt. 2003, svaraðir á almennum býráðsfundi tann 23. okt. 2003.

Jan Christiansen
borgarstjóri

Fyrispurningarnir eru hesir:

1. Hvussu nógv børn standa á bíðilistanum á branagarðsøkinum?
2. Nær verður barnagarðstørvurin í kommununi vantandi nøktaður?
3. Hvussu er/verður aldurs- og kynsbýtið á barnagarðsøkinum?
4. Hvussu er við Frítíðarskúlum? Eru ætlanir um at víðka hann til eisini at umfata 2. og møguliga 3. flokk?

1) Sambært Trivnaðarstjóranum í kunnandi teldubrævið tann 26. mars 2003, vóru 221 børn á bíðilistanum til barnagarðsøkið í kommununi tann 13. mars 2003.
Fyri stuttum, frætti undirritaða um barn, sum nýligani er uppskrivað á bíðilistan. At viðkomandi hevur fingið bræv frá Snarskivuni, har upplýst verður, at barnið stendur omanfyri nr. 500. Um hetta er rætt, so má eg spyrja hvussu tað ber til, at bíðilistin veksur so nógv uppá so stutta tíð? Um hetta ikki er rætt, er so nakað galið við uppskrivingarskipanini?

2) Tað hevur fleiri ferðir verið upplýst, at barnagarðstørvurin verður nøktaður í 2004! Sambært fyrr nevnda skrivið frá trivnaðarstjóranum, verða 242 fleiri pláss komandi ár. Hesi pláss nøkta ikki tørvin, um so er at bíðilistin í dag er omanfyri 500 børn. Hvørjar ætlanir eru um at loysa tropulleikan, um tey ætlaðu plássini ikki eru nøktandi.

3) Sum stoðan er nú, koma børnini á stovn sambært nummarinum á bíðilistanum. Stovnurin hevur als ongan møguleika at ávirka kyns- og aldursbýtið á stovninum ella stovuni. Hetta hevur sera óhepnar avleiðingar við sær, eitt nú at børn, ið hava aldur til vøggustovu mugu flyta upp í barnagarðarnar. Ella umvent, at eitt barn, sum av røttum skuldi farið í barnagarð, noyðist at halda fram í vøggustovuni, tí pláss ikki er í barnagarðinum. Eitt vøggustovupláss kostar foreldrunum munandi meira enn eitt barnagarðspláss, so tað hevur eisini figgjarligar fylgjur við sær.

4) Í álitinum "Børn og ung í Tórshavnar kommunu" frá 1996, ið er samtykt av Býráðnum, stendur: "…at Frítíðarskúlin skal víðkast til eisini at fevna um 2. og 3. flokk, samstundis sum hann fær hóskandi karmar at virka undir". Ætlar borgarstjórin at fylgja hesi samtykt? Um so er at ætlanin er at fylgja samtyktini, hvussu langt eru ætlanirnar so komnar?

Svar uppá fyrispurningarnar:

Viðv. punkt 1: Hvussu nógv børn standa á bíðilistanum á barnagarðsøkinum?

Bíðilistin tann 22.10.2003:

Tað standa **139 børn** bíðilistanum, sum eru børn uttan ansing og eru yvir 1/2 ár, harav 6 eru barnagarðsbørn, sum hava fingið bjóða pláss, men øll taka ikki av.

Viðv. uppskrivingini á høvuðsbíðilistan, so er tað nummarið á tí samlaða bíðilistanum, ið verður givið barninum. Hetta eru øll børn á bíðilistanum, eisini tey frá 0 til 1/2 ár, umframt øll børn sum eru í dagrøkt, tá tey framhaldandi standa á bíðilistanum til stovnspláss, á jøvnum føti við børn uttan ansing. Her eru eisini tey, ið ynskja ansing seinni enn í dag, og tí verður nummarið nakað høgt á høvuðslistanum.

Viðv. punkt 2: Nær verður barnagarðstørvurin í kommununi vantandi nøktaður?

Sitandi samgonga setti sær fyri at nøkta barnaansingartørvin í hesum valskeiðnum, og verður tørvurin nøktaður eftir summarfrítíðina 2004. Eisini setti býráðið sær fyri at nøkta barnagarðstørvin fyrst, tvs. at øll børn yvir 3 ár skuldu fáa stovnspláss, og er tað málið rokkið.

Í Kollafirði verða 40 barnagarðspláss tøk 1. nov. í ár og í sept. 2004 verða 127 nýggj stovnspláss latin upp. Harafturat koma 56 nýggj stovnspláss fyrst í 2005.

Viðmerkjast kann, at bíðilistin er stytst beint eftir summarfrítíðina, tá stovnarnir hava tikið nýggj børn inn, men síðan veksur bíðilistin alt árið, um ikki fleiri stovns- ella dagrøktarpláss koma afturat.

Viðv. punkt 3: Hvussu er/verður aldurs- og kynsbýtið á barnagarðsøkinum?

Sambært upptøkureglunum koma børnini inn eftir nummarinum á bíðilistanum og á tann stovn, sum foreldrini hava ynskt, og ynskini hjá stovninum verða síðan gingin á møti, um tað er gjørligt.

Hesar broytingarnar í upptøkureglunum hava fört við sær, at aldurin á børnunum í vøggustovunum er hægri enn hann fyrr hevur verið, tí tað eru tey eldru børnini, sum hava staðið longst á bíðilista, ið fyrst sleppa inn á stovn, meðan tey yngru fara í dagrøkt.

Tað eru fleiri børn í dag í vøggustovu, sum hava aldur til barnagarð, men tað er ikki pláss í barnagarðinum. Tá tørvurin verður nøktaður, verður aldursbýti meira javnt á stovnunum. Kynsbýti á stovnunum er ikki nakar trupulleiki.

Viðv. punkt 4: Hvussu er við Frítíðarskúlum? Eru ætlanir um at víðka hann til eisini at umfata 2. og møguliga 3. flokk?

Borgarstjórin ætlar at fylgja býráðssamtyktini frá 1996, í samband við álitið "Børn og ung í Tórshavnar kommunu" og at víðka frítíðarskúlan til eisini at fevna um 2. flokk, sum verður raðfestur fyrst. Kommunan hevur annars frítíðarskúla fyri 1., 2. og 3. flokk í Kaldbak og í Kollafirði. Frítíðarskipanin í Miðstovninum í Gundadali og frítíðarstovan í KFUM hava børn í 1. og 2. flokki.

Fyri at kunna víðka um frítíðarskúlan, skulu nógv hølir til, og er ætlanin at fara í gongd við hetta, so skjótt sum barnaansingartørvurin er nøktaður.

Í sambandi við at nýggjur skúli skal byggjast í Hoyvíkshaganum, hevur býráðið tann 25. sept. 2003 samtykt, at skúlin skal hýsa frítíðarskúla til 1. og 2. flokk.